# Studentask

**Fleiri tiltøk, samkomur og framsýningar hava verið í Hoydølum um vikuskiftið**

STUDENTASKÚLIN 70
*Rigmor Dam*
*rigmor@sosialurin.fo*
*Myndir: Rigmor Dam og Edith Johannesen*

Nú studentaskúlin í Hoydølum hevði 70 ára hátíðarhald um vikuskiftið, varð skipað fyri ymsum tiltøkum, bæði fyri almenninginum og innbodnum. Leygardagin var opið hús, har fitt av fólki hevði leitað sær niðan í Dalin Fagra. Har vóru bæði lærarar, politikarar, fyrrverandi næmingar og avvarðandi hjá starvsfólkum á skúlanum møtt upp. Og so næmingar, sum hjálptu til við framsýningum og framførslum hendan fjølbroytta hátíðardag skúlans, har tiltøk og virksemi var um allan skúlan.

Kl. 14 var skipað fyri lítlari samkomu í samkomuhøll skúlans, har Mikkjal Helmsdal, rektari, og Jógvan á Lakjuni, landsstýrismaður í skúlamálum, fluttu fram røður og blandað kór við næmingum og lærarum sang.

Nógv orka varð løgd í framsýningarnar hjá ymsu lærugreinunum. Millum tiltøkini vóru kaféir við mati, lutum, bókum og myndum frá ymsum mentanum, sum málfak skúlans eru knýtt at, umframt spurningaroyndir, har vitjandi kundu royna sína almennu vitan innan søgu, mentan og náttúrvísind. Harumframt vóru upplestur og tónleikur á skránni, og listaframsýning var við verkum hjá fyrrverandi næmingum. Eisini var framsýning av teimum lærubókum, sum lærarar skúlans hava greitt úr hondum upp gjøgnum árini.

Sunnudagin 2. september kl. 16 var almenn kvøldseta, har sangir vórðu framførdir úr teimum sangleikum, sum næmingar skúlans hava framført seinastu 10 árini, filmsbrot vórðu víst og hugleiðingar um skúlan og søgu hansara bornar fram.




*Mikkjal Helmsdal, rektari, frá kvøldsetuni í Hoydølum sunnudagin*



*Livandi tónleikur úr sangleikinum "Godspel". Christina Elisabeth Mørkøre syngur.*



*Sjónleikur var eisini á skránni sunnudagin. Her Lisa í Dali og Durita Dahl Andreasen, leiklistanæmingar 2006 – 2007*



*Livandi tónleikur úr sangleikinum "Skeyk". Rókur Jacobsen syngur sangin "Nakað lort".*



*Livandi tónleikur úr sangleikinum "Jósef". Jóannes Lamhauge syngur lagið: Gev mær onkran dreym.*